# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Økt tilvitan um umhvørvi

Seinastu tíðina hevur umhvørvi verið ovast á breddanum í nógvum lutum í føroyska samfelagnum. Og tað er sjálvandi sera gott, at vit gera okkum meira tilvitað um tann týdning tað hevur, at vit fara væl um umhvørvi.

Hesa vikuna skipar Tórshavnar Kommuna fjórða árið á rað fyri umhvørvisviku, har serlig tiltøk eru á skránni. Eitt ítøkiligt úrslit av hesum er, at tað er ókeypis at koyra við Bussleiðini í Havn. Hetta er veruliga eitt umhvørvistiltak, sum eigur at merkjast, eitt tiltak, sum í øllum førum upp á sikt minkar um bilaferðsluna og sum harvið eisini minkar um tørvin á útbyggingum á eitt nú parkeringsplássum. Eitt sera gott tiltak.

Eitt annað tiltak er sølubúðin, sum mánadagin lat upp í bygninginum hjá Brennistøðini á Hjalla. Øll, sum hava koyrt sær ein túr á brennistøðina vita, at nógv gott tilfar verður koyrt burtur – og at ALV so kann fáa nyttu og pening úr at selja hesar brúkslutir víðari til fólk, sum vilja keypa gamalt, kann bara vera gott.

Nógv hevur verið tosað um CO2 útlát – og hvussu vit kunnu minka um hetta útlát – og atlitið til Kyoto-sáttmálan. Í høvuðsheitunum eru tað el-framleiðslan, skipaflotin og húsarhald, sum dálka mest. Her eiga vit at stuðla upp undir allar royndir, sum kunnu minka um útlátið. Vatnorkan hjá SEV hevur verið nevnd, og onkur hevur funnist at, at farið verður undir framhaldandi stórar útbyggingar, har vit "einans" vinna 10% av útlátinum.

Her mugu vit sjálvandi semjast um, hvussu nógv vit vilja offra. Vilja vit varðveita okkara vøkru náttúru við vøtnum og áum, ella vilja vit lata burtur av hesum í ávísum økjum, til tess at útbyggja vatnorkuna. Skeri eg teg her, missi eg teg har...

Vit kunnu í øllum førum staðfesta, at fólksins tilvitan um týdning av at varða um um umhvørvi, er økt munandi – og tað fer at vísa bata.

**Sosialurin**

## Amerikanarar vildu ikki privatisera teirra postverk

**ÁLVUR DANIELSEN**



Í Føroyum tykist "gandaorðið" enn at vera "privatisering". Men í kapitalistiska "heimlandinum" U.S.A., verða sanniliga gjørd undantøk.

Sí greinina úr "Klassekampen" og les, hví amerikumenn IKKI valdu at "PRIVATISERA" postverkið har!!

Í Føroyum valdu vit at privatisera Postverk Føroya. Nærmast øll argument ella knep vórðu nýtt í fjølmiðlunum at rættvísgera hesa gerð.

Føroya Tele, SEV, Atlantic Airways vm. Standa fyri tørni ella hvussu?

Á sinni var fakfelagið "Føroya Postfelag" kroyst upp í ein krók. Úrslitið var eisini, at starvsfólk við høgum starvsaldri vóru diskriminerað, m. a. vóru fleiri uppsøgd. Tað seinasta nýggja er, at tey eldru postboðini við vunnari endaløn – nøkur eru har enn - í einari umlegging kanska skulu kroystast inn at arbeiða? Ynskir leiðsla og partafelagsnevndin at varðveita hesi starvsfólk yvirhøvur?

Í hesum døgum verður so lýst eftir ungum postbodum, sum helst ongantíð koma at fáa eina endaløn. Ella hvussu? Hvussu verða tey lønt og kanska útlendingar við, nú hurðarnar verða lætnar upp fyri teimum? Verða tey limir í fakfeløgunum?

Eru tad t. d. slíkar leiðslur, sum hon á Postverki Føroya, ið banka á dyrnar í Vinnuhúsinum, í Landsstýrinum og hjá løgmanni við? - og krevja, at hurðarnar eiga at standa víðopnar fyri útlendingum? Hetta fyri at sleppa at "hoppa bukk" við sáttmálar t. e. vunnin rættindi hjá fakfeløgunum.

Eg havi ikki nakað í móti einari varligari broyting av útlendingalógini; men tað skal vera við skili. Hetta er eitt lítið land, og fakfeløgini eiga avgjørt at verða við í hesum arbeiði.

Annars hava amerikumenn skilt, hví tað bara ikki altíð er rætt at privatisera; vinarliga sí greinina.

Góðu tit Ingeborg, Hans og onnur við: Takið tykkum ikki av tí, um tit verða skírd "ómøgulig" og so hitt "globalisering, skilja tit ikki"? Tað hava onnur roynt m. a. gamla Føroya Postfelag; men søgan hevur víst, at tey høvdu veruliga nakað at vera bangin fyri. Standið tí fast!

## Hava uppiborið fakliga viðurkenning

**ALMANNA-OG HEILSURØKTARAFELAGIÐ OG FØROYSKA PSYKIATRIFELAG**

**Ein trupulleiki hjá heilsurøktarunum er at fáa fakliga viðurkenning**

Í hesum døgum har tað verður tosað nógv um menning og trivnað.

Um vit skulu fáa heilsurøktarar at trívast og støðast, skulu vit hava fakliga viðurkenning. Tískil skal ein hugburðsbroyting til fyri at venda gongdini. Tað snýr seg um, at fakbólkarnir kenna fakligu førleikarnir hjá hvørjum øðrum og á tann hátt gagnnýta hann til fulnar.

Vit hava eina góða fleksibla útbúgvinging, har vit læra nógv um grundleggjandi og heilsufremjandi sjúkrarøkt, og síðani leggur utbúgvingin upp til at víðka um førleikan, alt eftir hvat fyri øki man starvast í. Útbúgvingin leggur eisini upp til tvørfakligt samstarv og at brúka hinar starvsbólkarnar optimalt, so at vit fáa eina góða dygd í sjúkrarøktini, og tað er kjarnan í okkara útbúgving. Heilsurøktarar hava sjálvstøðuga, løgfrøðiliga ábyrgd av sínum gerðum.

Vit hava longu nøkur góð arbeiðspláss, har røktarstarvsbólkarnir arbeiða meira tvørfakligt, og trivnaðurin er í hásæti, eisini á Landssjúkrahúsinum, tíanverri eru alt ov nógv av tí mótsetta eisini, har dupultfunktiónir eru og aðrir trupulleikar og har tann fakliga viðurkenningin manglar.

Vónandi fer tað ikki at taka so drúgva tíð, at fáa fakliga viðurkenning.

Nú útbúgvingin til heilsurøktara er komin til Føroyar, verður tað lættari at finna samleikan hjá heilsurøktaranum, tí tá skulu vit, heilsurøktarar og sjúkrarøtarfrøðingar, í felag læra næmingarnir upp.

Tá ið Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar pástanda, at um heilsurøktarar skulu útinna sjúkrarøkt á Landssjúkrahúsinum er vandi fyri, at røktin versnar og at hetta rakar sjúklingarnar, er tað ein pástandur sum vit als ikki kunnu taka undir við.

Tað ræður um at gagnnýta alt tað tilfeingi vit hava og at síggja møguleikarnar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.